# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andrea á Dul 80 ár



Leygardagin 6. august verður Andrea á Dul í Havn 80 ár. Andrea er fødd og uppvaksin í Kunoy. Tey vóru 6 systkin, Andrea er næstyngst og einasta, sum er eftir á lívi.

Foreldur hennara vóru Hans Christian Jacobsen úr Kunoy og Jacobina, ættað í Garði, av Strondum.

Systkin hennara vóru Hans Jacob, giftur við Oliviu, tey búsettust í barndómsheiminum í Kunoy, Elsebeth Malena, giftist við Símun Jensen úr Svínoy, Jógvan, giftist við Ellefíu og búði í Uppistovu í Kunoy, Sofus giftist við Óluvu, tey fingu sær eftirnavnið Dalsenni og búsettust í Klaksvík, og Súsanna (Sannemia), sum búði stóran part av lívi sínum í Hong Kong.

Andrea var bert 10 ára gomul, tá hon misti mammu sína, sum doyði av meslingum, og 22 ára gomul, tá pápin datt oman, tá hann var á fjalli.

Sum 14 ára gomul fór Andrea at tæna, fyrst í Kunoy, síðan til Klaksvíkar, og so til Havnar har hon hitti Grím á Dul, sum hon seinni giftst við. Tey búsettust í barndómsheiminum hjá Grími í Konradsbrekku. Grím kenna vit frá handlinum P/F Maria Poulsen, og var hann ein kend Havnarmynd. Grímur doyði í 1987.

Andrea og Grímur fingu 6 børn: Jakobina, gift við Napoleon Vang, Jógvan, Kristian, giftur við Poulu, f. Christiansen, Agnas, gift við Per Mortensen, Árna, og Guðrið, gift við John Eli Zachariasen. Ommubørnini eru 13 í tali og eitt langommubarn.

Andrea er altíð blíð og fyrikomandi at koma inn til. Hon er altíð í góðum lag, og vit eru mong, sum hava sitið væl inni hjá henni og fingið eitt gott prát og ein hugnaligan temunn. Andrea er sera vitug og lesur nógv og veit hvat fyriferst bæði her og úti í víðu verð.

Vit vilja øll ynskja Andreu hjartaliga tillukku við tí stóra degnum.

Dagurin verður hildin í Pálsstovu sunnudagin 7. august kl. 14.00, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá Andreu.

**Vinfólk**

## Andlát og jarðarferðir

Óli Hammer, úr Fámjin, andaðist mikudagin 3. august á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 81 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin klokkan 16:00. Jarðarferðin verður úr Fámjins kirkju sunnudagin klokkan 13:00.

Tummas Vilhelm, Klaksvík, andaðist á Norðoya Røktarheimi 3. august, 91 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið fríggjadagin 5. august klokkan 17.00. Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin klokkan 13:30.

Jákup Pauli Nielsen, fyrrverandi politistur í Vági, andaðist á Eldrasambýlinum í Vági, hósdagin 4. august, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Kelda: Útvarpið*

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við blómum, telegrammum, telefonuppringingum og á annan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegi okkara 18. juli takka vit hjartaliga.

**Olga á Tórálvur Mohr**

## Dagurin

**6. august. Kristi dýrd.** Dagur hildin til minnis um Jesu umbroyting á krossinum (Matt. 17, 1-9)

**7. august. Donatus**, deyður umleið 380. Drongurin Donatus misti bæði foreldrini, og undan forfylging flýddi hann til Arezzo í Italiu. Varð prestlærdur og endaði sum biskupur har á staðnum. Seinni varð hann tikin og hálshøgdur.

**8. august. Rut**. Dagurin vígdur minninum um kvinnuna, sum Rutarbók í Gamla testamenti er skrivað um. Týdningurin av bíbilska navninum er ókendur, kanska merkir tað *vinkona* ella *trúgv*.

# Sæunn Ólavsdóttir Hansen 55 ár

Í dag fyllir Sæunn Ólavsdóttir Hansen 55 ár. Sæunn er dóttir Ólavur og Elin Mariu Gregersen í Syðrugøtu.

Hon er gift við Jóannes Símunarson Hansen og eiga tey børnini, Símun, sum giftur við Randi og Ólavur, sum er giftur við Ester.

Hon eigur tvær ommudøtur, tær eita Sanna og Elin Maria. Ommudøturnar búgva báðar í Danmark, og nú tær eru heima í summarfrí, veit Sæunn ikki alt tað góða, hon skal gera fyri tær báðar.

Sæunn hevur handilsútbúgving frá Handelshøjskolen í Keypmannahavn, og í 70-unum starvaðist hon sum høgra hond hjá pápa sínum, til hann í 1980 legði árarnar inn. Tá tók hon virkið upp eftir hann, til hon í 1988 fór niður á Læknaskrivaraskúla.

Seinasta valskeið varð hon vald í Runavíkar býráð, har hon millum annað sat í fíggjarnevndini og sosialu nevnd.

Í býráðsarbeiðinum var Sæunn serstakliga nærløgd, og hon gongur við fullum huga upp í tað, sum hon fæst við. Hon er ein kvinna við fáum orðum, men hon avrikar nógv, har hon er.

Millum teir, sum hava arbeitt saman við henni í býráðnum, er hon nógv saknað, í arbeiðnum har.

Hon er ikki rødd fyri at siga sína síni sjónarmið, og førir tey fram greitt og við fáum orðum. Hennara stóri áhugi er sosial mál, og eldrapolitikkur er avgjørt hennara hjartamál.

Hon hevur lagt eitt stórt arbeiði í Eysturoyar Ellis og Røktarheim, og verandi útbygging hevur hennara stóra áhuga.

Síðani í 1989 hevur hon verið leiðsluskrivari á medisinsku deild. Við sínum viðføddu leiðaraevnum og vinnandi verumáta eydnaðist tað henni at lyfta læknaskrivarastarvið upp á eitt hægri støði.

Hon er formaður í læknaskrivarafelagnum í Føroyum og stendur eisini fyri læknaskrivaraútbúgvingini í her.

Sæunn er røkin og vælgjørd í øllum, sum hon arbeiðir við bæði á arbeiðsplássinum og heima við hús.

Kemur tú inn á gólvið í heiminum hjá Sæunn og Jóannes í Saltangará, er hon altíð bæði blíð og fryntlig, og tú skalt ikki hava sitið leingi hjá henni, til drekkamuðurin er komin á borðið, við onkrum leskiligum heimabakaðum afturvið.




*Í dag fyllir Sæunn Ólavsdóttir Hansen í Saltangará 55 ár*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Sæunn hevur vakra songrødd, og í sínum ungu árum setti hon sín dám á vælumtókta Midnáttarsangbólkin.

Vit ynskja Sæunn hjartaliga tillukku við degnum og nýta høvið at takka henni fyri ta gleði, sum hon við sínum friðsama smíli spreiðir rundan um seg.